## DAGSINS MEINING

# Ein háð ímóti føroyingum

Aftur hava verju- ella trygdarmyndugleikar í Danmark og í NATO lagt sektin á føroyingar og Føroya Landsstýri.

Í heili 16 ár søgdu danskir verjumyndugleikar einki við Føroya Landsstýri um ætlanina at byggja eina nýggja eftirlitsskipan á Loranstøðini á Eiði.

Og eftir at løgmansskrivstovan hevur ligið á upplýsingum og fyrispurningum í næstan tvey ár, er málið sent uttanlandsnevndini. Hví drálaði landsstýrið so leingi?

Tað ljóðar so óskyldugt at seta upp nakrar antennur – meistrar við Eiðisvatn á Eiði. Men onkur tól skulu óivað vera aftan fyri hesar antennur, hvar skulu tey vera og hvør hevur ábyrgdina av teimum?

Og hvat er endamálið við hesi eftirlitsskipan, sum skal boða frá, tá flogfør koma í førosykt loftrúm?

Spurningarnir eru nógvir og áhugaverdir, men meiri spennandi er tilmælið frá løgmansskrivstovuni ella uttanlandsdeildini.

Nú er ikki eydnast Sosialinum at fáa eitt eintak av teimum mongu skjølunum. Men sambært útvarpinum, sum hevur fingið fatur á tilfarinum í hesum máli, er tilmælið – um vit hava skilt tað rætt – at tað er torført at siga nei til útbyggingina, tí siga vit nei, kann tað vera til ampa fyri sjálvstýristilgongdina!

Tað síðsta føroyski almenningurin fekk at vita, var at ein ovasti í byggitænastuni hjá donsku verjuni, helt at tað loysti seg ikki at brúka tíð at kunna føroyskar myndugleikar, tí útbyggingin varð kanska av ongum?

Hetta er einki annað enn at føroyskir myndugleikar eru háðaðir einaferð afturat. Tað hevði ikki tikið so drúgva tíð at sent eitt skriv saman, har landsstýrið varð kunnað um ætlanina, sum ivi kortini varð um.

Henda síðsta avdúkingin er aftur eitt dømi um, at hvørki danir ella NATO-myndugleikar virða føroyingar og føroyskar myndugleikar tað allarminsta.

Vit sóu í Svørtubók, hvussu lítið danskir og NATO-myndugleikar virdu Føroya Landsstýri, tá NATO skuldi byggja støð í Føroyum í 50-árunum. Bara sitandi løgmenn vórðu kunnaðir, og tað stóð upp til teir, um teir kunnaðu landsstýrið.

Øll framferðin í hernaðarmálinum, sum tað tá varð allað, og framferðin í samband við útbyggingarnar vísa, at Danmark og Føroyar eru ikki tvey javnsett lond. Eitt krav má tí verða – líka mikið hvør fer at manna landsstýrið – at føroyingar fáa allar upplýsingar um trygdar- og verjupolitikk Danmarkar og NATO í Føroyum og at føroyingar fáa avgjørda ávirkan á henda politikk!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Parlamentarisma = Ábyrgd

**Julius Djurhuus**

Politiska støðan í dag er fastlæst. Partvíst tí at Miðflokkurin ikki skilir hvussu ein fremur sínar ætlanir og partvíst tí at Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin vilja steðga ætlanini um sjálvstýri Føroya fólks.

### Miðflokkurin

Formaðurin í flokkinum hevur víst seg sum ein politikkara, ið sigur eitt áðrenn valið, men vísir hvat hann meinar aftaná. Slíkum politikkarum hava vit sum veljarar havt fleiri av gjøgnum 80'ini og 90'ini. Í dag ynskja øll, at teir valdu standa við síni vallyftir. Flokkurin gekk inn fyri størri sjálvstýri áðrenn valið, men við blokadu av realitetssamráðingum hevur flokkurin tíðiliga víst, at endamálið var ikki at fáa eina meiri kristnaða føroyska tjóð, men eina meiri kristnaða danska tjóð.

### Javnaðarflokkurin

Hesin flokkur hevur ein leiðara, ið er sum Iznogood í teknirøðini. Hann vil verða løgmaður, bert fyri at vera løgmaður. Og eitt aftrat; hann vil steðga øllum fólkaatkvøðum um sjálvstýri Føroya fólks við at tøma landskassan.

### Sambandsflokkurin

Er ímóti fyri at vera ímóti. Og eitt aftrat; hann vil steðga øllum fólkaatkvøðum um sjálvstýri Føroya fólks við at tøma landskassan. Einasti máti at steðga tilgondini er júst at tøma landskassan.

### Hvat nú

Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin droymdu um at skipa nýggja heimastýrissamgongu saman við Sjálvstýrisflokkinum og Miðflokkinum. Hvønn politikk ætlaðu hesir stóru flokkar so at fremja við hjálp frá teimum smáu. Jú, endamálið var og er at steðga ætlanini um sjálvstýri Føroya fólks. Hvussu lágt kann eitt fólk søkka, tá teirra egna blóð ynskir at onnur her skulu valda?

### Enn einaferð

Tað er mín vón at verandi samgonga fer at halda fram á einhvønn hátt. Tryggjast má, at eingin flokkur, ið ikki viðurkennur ognarræðið til sítt egna land, fær ávirkan. Vit mugu minnast til at uttan kensluna av at einaferð at verða sjálvstøðug, høvdu vit einki føroyskt mál, onga føroyska bíbliu, onga føroyska kirkju, ongan føroyskan skúla, einki føroyskt flagg og slettis onga vón um at sleppa undan biddaraklæðunum. Vit høvdu í dag tískil við hávirðing sagt, at ein føroyingur er ein danskari búsitandi í Føroyum.

### Parlamentarisma = ábyrgd

Nú sleppur andstøðan so at standa sína roynd. Meinar Javnaðarflokkurin at vit skulu hava fleiri røktarheimspláss? Ella fara teir at niðurstemma slíkt við einari neyðarsligari undanførslu? Fara Sambandsflokkurin og Miðflokkurin at gera tað sama? Fara hesir flokkar at seta seg sjálvan í hásætið? Og ikki viðurkenna, at tað at verða valdur krevur eisini at ein vísir ábyrgd yvir sínum veljarum? Teirra veljarar hava jú ikki bert valt at steðga ætlanini um sjálvstýri Føroya fólks, men hava eisini valt at fleiri røktarheimspláss skulu byggjast.

# Áheitan á løgmann

**Føroya Javnaðarflokkur**

### Soljóðandi skriv er í dag sent Anfinni Kallsberg, løgmanni:

Føroya Javnaðarflokkur skilir til fulnar ta misnøgd, sum hevur tikið seg upp millum suðuroyingar, nú suðuroyarsiglingin aftur gjørdist offur fyri vánaliga planlegging frá landsins myndugleikum.

Flokkurin minnir á, at tað ólag, sum verið hevur hvørt einasta ár á suðuroyarleiðini, tá Smiril skal á sleipistøð, stavar frá tí politisku skarnsgerð, ið gjørd varð, tá Teistin varð seldur av landinum.

Hin vegin so skerst ikki burtur, at tað neyvan kann koma ávart á landsins leiðslu, at Smiril skal á sleipistøð hvørt einasta ár. Tísikil er henda fram eftir fummum loysn, sum hvørt ár verður tikið til, óhaldbar. Hetta er prógv um politiskan og umsitingarligan ódugnaskap, sum als ikki kann góðtakast.

Undir verkfallinum lá Smyril svínabundin við bryggja ú Havn, soleiðis at hann heldur ikki kundi tæna sum tilkalliskip, um neyðugt varð við sjúkraflutningi, og flúgvilíkindi ikki vóru. Hin vegin var verkfallið so mikið drúgvt, at alt dokkingararbeiðið lættliga kundi verið fingið frá hondini, um myndugleikarnir í staðin løgdu Smyril inn á Skála.

Støðan hjá avloysaraskipinum Scaniu kann ikki koma ávart á myndugleikarnar. Borð og stólar eru leys til stóran ampa fyri ferðafólk. Harumframt so kann skipið als ikki taka tyngri farm, tá einki kann surrast á dekkinum. Hóast vitandi um alt hetta, so var einki gjørt fyri at bøta um hesi viðurskifti, hóast skipið hevur ligið við bryggju í Klaksvík í fleiri vikur. Men í staðin roynir man skipið ein túr fyri síðan at seta annað skip inn, sum øll frammanundan vita er óegnað til farleiðina.

Javnaðarflokkurin heitir tí á løgmann um at geva suðuroyingum og øllum øðrum eina almenna frágreiðing um gongdina í málinum. Endaliga verður heitt á løgmann um at taka neyðugu stigini til tess, at hetta óskil ikki fær loyvi at endurtaka seg.

# Matiné í Havnar kirkju við harmonikutónleiki

**MATINÉ**
*Tíðindaskriv*

Í dag, leygardagin, kl 11.30 verður Matiné í Havnar kirkju. Hetta verður helst fyrstu ferð, at konsert er í kirkjuni við harmonikutónleiki.

Tað eru svenskir og norskir tónleikarar, sum fara at spæla eina skrá, ið er gjørd til kirkjulig høvi við klassiskum verkum fyri hetta ljóðføri.

Hetta er í sambandi við, at stór harmonikustevna er í Havn í hesum døgum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Anker vitjar Havnina

**Í gjár hitti Anker Jørgensen fólk í Undirhúsinum í Vágsbotni og í Eldratilhaldinum í Tórsgøtu. Eisini vísti Edmund Joensen, løgtingsformaður honum nýumvælda tinghúsið**

**VITJAN**
*Eirikur Lindenskov*

Í hesum døgum er fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Anker Jørgensen, á vitjan í Føroyum saman við vinkonu síni, Vivy Niemand. Hann hevur verið her fyrr sum forsætisráðharri, men ongantíð sum privatpersónur.

Anker Jørgensen gjørdist forsætisráðharri í Danmark so brádliga, tá Jens Otto Krag, uttan nakran vardi, legði frá sær dagin eftir fólkatkvøðuna í Danmark í 1972 um EF-limaskapin.

Fyrrverandi forsætisráðharrin kom til Føroya hósdagin við flogfari. Seinnapartin hósdagin vitjaði hann í Norðurlandahúsinum, har Helga Hjörvar vísti hon húsið, sum ikki varð bygt, tá hann seinast vitjaði í Føroyum.

Hóast tað eru 20 ár síðani, at Anker Jørgensen legði frá sær sum forsætisráðharri, so er hann ein nógv umbiðin fyrilestrahaldari. Einar tríggjar ferðir um vikuna er tann dámli 79 ára gamli maðurin úti til fyrilestrar til ymisk høvi, alt frá studentaskúlum til pensjónistafeløg.

Í Norðurlandahúsinum hósdagin greiddi hann frá um seg sjálvan og um ymiskt, hann hevur upplivað sum forsætisráðharri, og um persónligheitir, hann hevur hitt í hesum starvi. Ein frágera góður frásøgumaður er hann – og ikki sørt skemtiligur við sínum speisku og sjálvironisku viðmerkingum.



*Anker Jørgensen og vinkona hansan, Vivy Niemand í Miðbýnum í Havn saman við Jákup Lindenskov, fyrrverandi fólkatingsmanni, sum vísti teimum Havnina fríggjamorgunin*

Í gjár, fríggjadagin, vitjaði Anker Jørgensen í Havnini.

Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen og skrivstovustjórin, Súsanna Danielsen vístu honum nýumvælda løgtingshúsið, har ein háskúlaflokkurin eisini fekk høvið at Anker Jørgensen.

Síðan varð vitjað i Undirhúsinum, har Eigil Hansen og aðrir fastir fúsir fúsir fingu eitt hugnaligt prát.

Kl 11 vitjaði Anker Jørgensen í Tilhaldinum í Tórsgøtu, har fitt av fólkið varð komið saman fyri lýða á og hitta fyrrverandi forsætisráðharran.

Í dag, leygardag, vitjar Anker Jørgensen í Klaksvík, og í morgin verður farið í Sandoynna. Anker Jørgensen og Vivy Niemand fara aftur til Danmarkar við flogfari mánadagin.



*Edmund Joensen, løgtingsformaður, og Súsanna Danielsen, skrivstovustjóri, vístu Anker Jørgensen nýumvældu løgtingshúsini*



*Anker Jørgensen í práti í Undirhúsinum í Vágsbotni*

# – Jeg ville ha' en menigmandsbil!

**Gamli ráðharrabilurin hjá Anker Jørgensen, ein Ford Granada frá 1976, stóð fyri honum, tá hann vitjaði Norðurlandahúsið hósdagin**

**RÁÐHARRABILUR**
*Eirikur Lindenskov*

Tá Anker Jørgensen hósdagin seinnapartin vitjaði í Norðurlandahúsinum í Havn, stóð fyri honum ein gamal Ford Granada. Hetta var ikki ein tilvildarligur bilur, men ein sera vælútgjørdur Granada Ghia við sóltaki, automatiskum gearum og einum v-6 motori.

Tað vóru limir í Føroya Ellisakførum, sum høvdu sett bilin uttan fyri Norðurlandahúsið, tí hetta er gamli ráðharrabilurin hjá Anker Jørgensen. Bilurin er frá 1976, og er vist tann næsti ráðharrabilurin hjá Anker Jørgensen.

Petur Hansen í Havn, sum eigur bilin, ætlar at seta hann í stand, hóast hann er heldur illa farin. Bilurin hevur sína serligu søgu, og tað ger tað serliga áhugavert, sigur hann.

Tað hevur í mong ár verið siðvenja, at ríkisumboðsmaðurin í Føroyum fær gamla forsætisráðharrabilin. Soleiðis fekk Leif Groth gamla Volvo 164 bilin, sum Jens Otto Kragh hevði sum ráðharrabil. Síðani kom hesin hjá Anker Jørgensen. Niels Bendtsen fekk Granablin hjá Schlüther, sum Anker Jørgensen helst eisini hevur havt, og bilurin, sum nú stendur í garasjuni hjá Birgith Kleist, ein grønur BMW, er gamli ráðharrabilurin hjá Poul Nyrup Rasmussen.

Anker Jørgensen greiddi Sosialinum frá, at tá hann gjørdist forsætisráðharri í 1972, vísti skrivstovustjórin í forsætismálaráðnum honum bilin, ein Mercedes.

– Men den ville jeg ikki ha', segði Anker Jørgensen – og leggur afturat, at skrivstovustjórin gjørdist sera bilsin.

Anker Jørgensen segði, at hann vildi demonstrera. Hann vildi ikki koyra í einum fínum Mercedes, tí tað gjørdi Hitler eisini, tá hann gjørdi innrás í Pólland og Eysturríki. Og so leggur hann skemtandi afturat, at hann hevði ikki brúk fyri einum bili, sum var til fólk við longum beinum. Endin var, at tann blað ungi ráðharrin, Svend Auken, fekk Mercedesbilin, meðan Anker Jørgensen fekk ein Ford – ein »menigmandsbil«, sum hann sjálvur tekur til.



*Anker Jørgensen hittir aftur gamla ráðharrabilin, sum hann hevði í 1976. Tá hann varð skiftur út, varð hann sendur til ríkisumboðsmannin í Føroyum, sum vanliga »arvar« forsætisráðharrabilin, tá hann verður skiftur út*
Mynd: Jens Kristian Vang